# Lærlingur og starvsfólk

Søkt verður eftir lærlingi og fólkið m/k at byrja skjótast tilber.

**Starvið umfatar:**
- alt innan blómubinding
- annars alt fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir einum fólki, ið kann
- arbeiða sjálvstøðugt
- er kreativ/ur
- er fyrikomandi
- hevur koyrikort

**Lønarviðurskiftir:**
Eftir avtalu.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. september.

Ynskja tygum at vita meira um starvið, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við okkum á tlf. 31 74 00

*Árstíðirnar*
BLÓMUHANDIL
J.C. Svabosgøta 10
100 Tórshavn



# Málsviðgeri/skrivari

**Á sosialu deild í Tórshavnar kommunu er eitt fulltíðarstarv sum málsviðgeri/skrivari leyst at søkja. Starvið verður sett skjótast gjørligt.**

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar. Umframt at vera skrivari hjá deildarleiðaranum, eru uppgávurnar m.a., at

- Fyrireika og avgreiða mál hjá sosialu nevnd
- Umsita bíðilistan til búpláss til ymisku tilboðini til eldru í kommununi og vera skrivari hjá upptøkunevndini
- Visitera brúkarar til Serflutningsskipan Landsins
- Umsita bíðilistan til vardu íbúðirnar í kommununi

**Útbúgving/royndir**
Viðkomandi útbúgving og fyrisitingarligar royndir.
Kunnleiki til EDV á brúkarastøði og kunnleiki til og royndir á sosialfakliga økinum eru ein fyrimunur.
Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava evnini at »hava fleiri bóltar í luftini í senn«.
Skal vera røkin, framsøkin og duga at samskifta.

**Kommunan bjóðar**
áhugavert starv við fjølbroyttum uppgávum í einum mennandi fakligum umhvørvi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er normerað í 3. lønarflokki sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal verða Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 27. august 2007.

REPROZ

**Tórshavnar kommuna**



# Til sølu

Opel Vivaro vøruvognur. Diesel 1.9, hevur oljufýring.

Koyrt 11.500 km. Árg. 2004.

**Tlf. 315508 / 225673**

# Almennur fundur um kvinnur í politikki

**Týskvøldið 28. august kl. 19.30 verður almennur fundur í Losjuni í Havn, Tinghúsvegur 18.**

**Ásannandi at ov fáar kvinnur eru í politikki – einans 3 kvinnur hava sæti í løgtinginum og ongin kvinna er í landsstýrinum** – hevur Javnstøðunevndin arbeitt við ymsum uppskotum, ið kunnu stimbra undir gongdina at fáa fleiri kvinnur at luttaka í landspolitikki.

Á fundinum fer formaðurin í Javnstøðunevndini, Kári á Rógvi, løgfrøðingur at greiða frá uppskoti/hugskoti, sum kann verða við til at fáa betri javnvág millum kvinnur og menn í politiska arbeiðnum í løgtinginum.

Nortið verður eisini við, um §18 í galdandi vallóg loyvir verandi flokkum at stilla "kvinnulistar" upp í valdømunum.

Eftir framløguna verður høvi at seta spurningar og gera viðmerkingar.

Fundarstjóri verður Solby Eliasen, útvarpskvinna.

Umrøddu uppkot/hugskot kunnu lesast á heimasíðuni www.javnratt.fo hjá Javnstøðunevndini undir teiginum Ársfrágreiðingin 2006.

**Aftanfyri tiltakið standa:**
Javnaðarflokkurin
Sambandsflokkurin
Tjóðveldisflokkurin
Fólkaflokkurin
Sjálvstýrisflokkurin

## Rørsmiðir/handverkarar og lærlingar

Søkt verður eftir rørsmiðum ella handverkarum til Rørtænastuna, sum eru fyrikomandi og kunnu arbeiða sjálvstøðugt.

Søkt verður eisini eftir lærlingum.

Best er um viðkomandi hevur koyrikort.

Áhugaði kunnu senda umsókn til:

**Sp/f Rør-tænastan**
í Geilini 5
FO-175 Kirkjubøur.

Hava tit spurningar/ivamál kunnu tit venda tykkum til Eyðfinn Hansen á telefon 228180.

**rør**-*tænastan*
*Vatn•Hiti•Sanitet•Ventilatión*

# Handilsbygningur til sølu

Handilsbygningur við Klaksvíksvegin 34 til sølu, um hóskansi boð fæst.

**Tlf. 456428 ella 220606**

# Málningar til sølu

Málningar til sølu eftir: S. J. Mikines, Ingálvi av Reyni, Jóannesi Kristiansen, Sigmundi Petersen og Bibi.

Málningarnir verða seldir, um hóskandi boð fæst.

Gjøllari upplýsingar fáast við at ringja tlf. 21 49 77.